# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*



# Eystara bryggja í Havn í 1965

Her er ein mynd, sum vit hava gjørt eina roynd at tíðarfesta. Vit eru komin til tað úrslit, at hon helst er frá 1965. Myndin er tikin á Eystaru bryggju í Havn.

Fremst á myndini er strandfaraskipið Sigmundur hjá Thorshavans Mælkeforsyning og Margarinefabrik, sum sigldi frá 1950 til 1967.

Síðan koma fraktbátarnir Rókur og Rókur II hjá Skipafelagnum Føroyar. Uttan á teimum er strandfaraskipið Ternan, sum landið átti og kom til Føroyar í 1946. Í 1962 varð Ternan seld til Mjólkaforsýningina og sigldi til 1975.

Í krókinum er ferðamannaskipið Tjaldur hjá Skipafelagnum Føroyar sum kom í 1953 og varð selt av landinum í november 1967. Aftan fyri Tjaldur er ferðamannaskipið Dronning Alexandrine hjá DFDS, ið sigldi til Føroyar frá 1927 til á vári í 1965. Síðan sæst Bakur hjá Skipafelagnum.

Bilurin á myndini er ein Ford Taunus 17m við nummarplátuni Fø 7.387. Við hjálp frá Ford-arkivinum hjá P/F Wenzel, hava vit funnið fram til, at talan er um hýruvognin hjá John Simonsen á Argjum, sum koyrdi á bilstøðini BIL (tel. 1444) í Havn. Bilin keypti John í november í 1964.

Okkara niðurstøða er, at 1965 er ikki langt av leið. Av tí at bilurin er komin síðst í 1964 og Dronning Alexandrine gavst at sigla til Føroyar á vári í 1965.

Um onkur veit meira um hesa myndina, er viðkomandi vælkomin at kontakta Annfinn Danielsen á telefon: 224124.

**Dagurin**

**23. mai. Desiderius.** Tvey halgimenni bera hetta navn. Annar var biskupur í Langres í Fraklandi, tikin av døgum í 364 ella 411. Hin var biskupur í Vienne í Fraklandi, steinaður til deyða í 608. Týdningurin er hin ynskti.

